HÝSA

Melanogrammus aeglefinus

Serføroyskur fiskastovnur
Gagnfiskur
Botnfiskur
Elsta aldursgreinaða hýsa undir Føroyum: 18 ár
Longsta mátaða hýsa undir Føroyum: 112 cm

Lívfrøði

Øll hýsa undir Føroyum verður mett sum ein stovnur.

Útbreiðsla

Hýsa er við Novaja Semlja, í Hvítahavinum og við Svalbard suður í Kattegat og Norðsjógvin til Biskeia-víkina (Mynd 1). Undir Føroyum og Íslandi. Frá Nýfundlandi til Cape Hatteras. Hýsa er sjáldsom í Grønlandi, men er vorðin vanligari hesi seinastu árini.



Mynd 1. Útbreiðsla av hýsu.

Hýsa er vanlig bæði á Landgrunninum, Føroyabanka, Ytrabanka og Ytstabanka og er fingin frá heilt grunnum vatni inni við land og niður ímóti 600 m dýpi; tað er tó sjáldsamt at fáa hýsu djypri enn 450 m.

Vøkstur

Vøksturin á hýsu undir Føroyum er rættiliga ymiskur. Vøksturin er minstur á bankunum eystanfyri, serliga á Sandoyarbanka, og økist so vestureftir; besti vøksturin er á Føroyabanka. Vøksturin minkar nógv, eftir at hýsan er vorðin kynsbúgvin (Mynd 2).

Nytran á hýsu er lutfallsliga stór (Mynd 3), og tí verður hon skorin, áðrenn hon verður lisin fyri at síggja aldursringarnar betri.

Longd móti vekt fyri allar støddir av landaðari hýsu sæst á Mynd 4. Miðalvektin á 60 cm langari hýsu var í kruvdari vekt umleið 1,8 kg árini 2009-2013.



Mynd 2. Miðallongd móti aldri mátað á yvirlitstrolingunum um várið á Landgrunninum 2009-2013. Víst er, nær helvtin av hýsuni er búgvin at gýta fyrstu ferð.



Mynd 3. Hýsunytrur.



Mynd 4. Longd móti vekt mátað frá landingum, árini 2009-2013.

Kynsbúning

Í miðal gýtir helvtin av hýsuni fyrstu ferð umleið 2,5 ára gomul; tá er hon um 35 cm til longdar (Mynd 2).

Um hýsa er kynsbúgvin ella ei, verður kannað við at hyggja at kynsgøgnunum. Í tí sambandi verður skrásett, hvussu langt í búningini hýsan er komin. Ein óbúgvin hýsa hevur búningarstig 1 og ein búgvin hýsa búningarstig 2-7, alt eftir hvar í ringrásini hon er.

Gýting

Gýtingartíðin hjá hýsu er frá mars til mai; meginparturin av gýtingini er tó í seinnu helvt av apríl. Gýting er staðfest víða um í føroyskum sjógvi, bæði inni á summum firðum og á Landgrunninum og bankum. Tað mesta av gýtingini er tó á trimum lutfalsliga víðum økjum norðan-, eystan- og vestanfyri, á einum minni øki sunnanfyri og á Føroyabanka (Mynd 5). Gýtingarøkini eru tó ikki so avmarkað, sum tey hjá toski, og sjálvt á økjunum víst á Mynd 5 tykist gýtingin at vera rættiliga skiftandi ár undan ári. Gýtingardýpið er 50-200 m, fyri tað mesta djúpri enn 100 m.



Mynd 5. Høvuðsgýtingarøkini hjá hýsu undir Føroyum.

Yngul og ungfiskur

Eftir gýtingina flotna rognkornini upp í sjógvin og verða spjadd við rákinum kring landgrunn og bankar; sama er við larvunum. Yngulin (Mynd 6) er uppi í sjónum í nakrar mánaðir, men í tíðarskeiðnum juli-september leitar hann niður á botn á umleið 90-200 m dýpi.



Mynd 6. Hýsuyngul fingin við Magnusi Heinasyni á yngultúri síðst í juni, har trolað varð uppi í sjónum.

Hetta, at hýsa veksur upp á vanligari fiskileið, meðan toskur og upsi vaksa upp inni við land, er vert at leggja sær í geyma, tí hýsan er tískil ikki so væl vard tey fyrstu árini. Tann hýsan, ið tekur botn á lutfalsliga djúpum vatni, leitar vanliga inn á grynri vatn, tá hon er 1-2 ára gomul.

Ferðing

Hýsa við Føroyar flytir ikki til og frá øðrum havøkjum, og undir Føroyum er hon rættiliga støðuføst.

Hýsan kann fara á bæði harðbotn og bleytan botn, men er kanska serliga nógv á bleytum botni. Tað tykist, sum um tað er útboðið av føði, ið er avgerandi fyri valið av botni. Av og á leitar hýsan, serliga ungfiskurin, upp í sjógvin eftir føði.

Føði

Høvuðsføðin hjá hýsu er ymisk maðkasløg, krabbadjór og tindadjór, serliga slangustjørnur, men eisini fiskur og lindjór verða etin (Mynd 7).



Mynd 7. Føðin í vekt í hýsumagum býtt í høvuðsbólkar um várið og um summarið árini 2009-2013.

Veiða

Veiðutøl fyri hýsu undir Føroyum eru tøk síðan 1903 (Mynd 8). Fyrstu mongu árini fiskaðu aðrar tjóðir, serliga bretar, so gott sum alla hýsuna. Miðskeiðis í 1950-unum vaks føroyski parturin av hýsuveiðuni munandi, og eftir at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hava føroyingar sjálvir fiskað at kalla alla hýsuna undir



Mynd 8. Heildarveiðan av hýsu undir Føroyum 1903-2013 í rundari vekt.

Føroyum. Miðalveiðan síðan 1903 hevur verið knøpp 12,5 túsund tons, men tíðarskeiðini hava verið rættiliga ymisk (Mynd 8). Áðrenn 1. veraldarbardaga lá veiðan í fleiri ár um 7-11 túsund tons, minkaði so í krígsárunum niður á nærum einki, men vaks so aftur í 1920- og 1930 árunum til millum eini 10 og 15 túsund tons. Veiðan undir 2. veraldarbardaga lá um 2-5 túsund tons, men so tók hon dyk á seg og lá oman fyri miðalveiðuna til 1990, onkur ár millum 20 og 28 túsund tons. So komu kreppuárini 1992-1995, har veiðan lá um 4-5 túsund tons. So bragdaði knappliga aftur, og árini 1997-2007 var hon væl oman fyri miðal, onkur ár millum 20 og 27 túsund tons. Síðan 2007 er veiðan minkað ógvusligt niður á eitt sera lágt støði seinastu 3 árini.

Aldursbýtið í hýsuveiðuni undir Føroyum í 2013 er víst á Mynd 9. Hon vísir, at meginparturin av hýsuni



Mynd 9. Lutfalsliga aldursbýtið í hýsuveiðuni undir Føroyum í 2013.



Mynd 10. Miðalvektir á 3-6 ára gamlari hýsu undir Føroyum 1977-2013.

var 3 og serliga 4 ára gomul, og at bert lítil partur av fiskinum var 5 ár og eldri. Miðalvektir fyri hýsu undir Føroyum hava skift nógv gjøgnum árini. Miðalvektir fyri 3-6 ára gamla hýsu árini 1977-2013 er víst á Mynd 10. Eftir at vektirnar støðugt minkaðu í nøkur ár herfyri, eru tær nú aftur vaksandi.

Á landingarmiðstøðunum kring landið verður hýsan bólkað í 5 støddarbólkar, alt eftir vekt. Í Talvu 1 er víst á leið, hvussu gomul og hvussu long hýsan er í mun til vektbólkarnar 1 til 5.

Talva 1. Umrokningartalva út frá støddarbólkum. Virðini byggja á tøl fyri árini 2009-2013. Aftasta kolonnan sigur, hvussu stórur partur av fiskinum í ymsu støddarbólk-unum væntandi hevur gýtt minst einaferð.

	Vekt (kg)	Aldur (ár)	Longd (cm)	% Búgvin
Stødd 1	2,0+	7-11+	59-68+	100%
Stødd 2	1,0-2,0	4-9	49-59	97-100%
Stødd 3	0,5-1,0	3-7	40-49	73-100%
Stødd 4	0,3-0,5	2-4	33-39	9-73%
Stødd 5	<0,3	1,5-2	28-32	0-9%

Stovnsmeting

Stovnsmetingarnar av hýsu undir Føroyum eru grundaðar á hagtøl viðvíkjandi heildarveiðu í vekt og í tali fyri hvønn aldur; og á veiðu í tali upp á roynd (tal á troltímum, tal á húkum) fyri ymiskar skipabólkar hvør sær og serliga á tilfar frá vár- og summaryvirlitstrolingunum við Magnusi Heinasyni. Tilfar er tøkt at gera stovnsmetingar av hýsustovninum aftur til 1957.

Í hvørjari stovnsmeting (VPA) verður m.a. fiskideyðatalið, gýtingarstovnurin, og tilgongdin roknað út fyri hvørt ár. Stovnsmetingar frá einum ári til annað geva ikki sama úrslit. Sum heild er lítil og eingin broyting í úrslitunum fyri árgangir, sum hava verið gjøgnum fiskiskapin og eru uppfiskaðir/deyðir. Úrslitini fyri árgangir, sum hava verið stutta tíð í fiskiskapinum kunnu broytast frá einum ári til annað, júst tí at ein hevur fleiri tøl at halda seg til. Serliga úrslitini frá seinastu árunum kunnu broytast rættiliga nógv.

Tilgongdin av hýsu undir Føroyum (tal á 2-ára gamlari hýsu) er víst á Mynd 11. Her sæst, at tilgongdin hevur verið sera skiftandi síðan seinast í 1970-árunum, har nógvir smáir árgangir hava sett til stovnin, og so nakrir fáir góðir og sera góðir árgangir eru komnir undan; serliga árgangirnir frá 1993, 1994, 1999 og 2000 vóru framúr. Øll tilgongdin síðan 2005 hevur verið sera lítil og væl undir miðal.



Mynd 11. Tilgongdin til hýsustovnin 1957-2013 gjørd upp fyri hvønn árgang sum tal á 2 ára gomlum fiski.

Støddin á gýtingarstovninum síðan 1957 er víst á Mynd 12; eftir nøkur góð ár rundan um ár 2000, er hýsustovnurin nógv minkaður, og hann hevur ongantíð verið so illa fyri sum hesi seinastu 4 árini.

Miðal veiðutrýst fyri aldursbólkarnar 3 til 7 ár aftur til 1957 sæst á Mynd 13. Veiðutrýstið var sera stórt fyrstu árini, men bæði veiða og stovnur vóru á høgum stigi serliga vegna góða og javna tilgongd. Veiðutrýstið minkaði síðan munandi, men tað gjørdi stovnurin eisini, lutvíst vegna minkandi miðalvektir og vegna lítla



Mynd 12. Gýtingarstovnurin hjá hýsu við ársbyrjan 1957-2013.



Mynd 13. Veiðutrýstið á hýsustovnin 1957-2013 roknað sum miðal fyri aldrarnar 3 til 7 ár. Vinstrumegin víst sum virðið F og høgrumegin sum % fiskað úr stovninum.

tilgongd. Tað vaks tó aftur, so hvørt omanfyri nevnda góða tilgongd kom inn í stovnin. Úrslitið var, at veitt varð meira enn ráðiligt, og tað toldi stovnurin ikki.

Forsagnir

Hóast veiðutrýstið seinastu fáu árini í miðal er minkað nakað (Mynd 13), so er lítið sannlíkt, at gýtingarstovnurin fer at hækka upp á eitt meira hóskandi støði næstu fáu árini. Høvuðsorsøkin er, at tilgongdin hevur svikið í nógv ár (Mynd 11). Tilgongdin í 2012 og 2013 var sera lítil. Tilgongdin í 2014 verður mett at vera eina helvt av tilgongdini í 2011, ið aftur var eina helvt av langtíðar miðal.

Keldur

ICES, 2014. NWWG 2014.
Mouritsen, R. 2007. Fiskur undir Føroyum.
Jákupsstovu, S. H. í, 2004. Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár. Úrdráttur úr hagtølum frá ICES.

Ábyrgdarfrøðingur: Jákup Reinert